# Jógvan á Lakjuni får det røde kort

OLE WICH



**Nu er vores stakkels ”kultur”minister fornærmet igen**

I Sosialurin mandag d. 14. januar ser Jógvan á Lakjuni rødt og beklager sig fornærmet over at fire kulturfolk med rette kritiserer den politiske indsats indenfor kulturområdet. Han klynker, at det er politisk angreb på ham og det må de sandelig ikke, for kultur har intet med politik at gøre. Det er ikke for almindelige folk og da slet ikke forvirrede kulturpersoner. Politik skal vi åbenbart ærbødigs overlade til politikerne. Det kan man aflæse af hans udtalelser.

Det viser med tydelighed hvor lidt vores kulturminister ved om det område han uheldigvis er sat til at administrere. Jógvan á Lakjuni har så lidt forståelse for kultur, at han ikke engang ved, at kunst til alle tider har haft en politisk dimension. Det ser ud til at han helst vil reducere kultur og kunst til skøn korsang og smukke intetsigende skilderier på væggen, men det er der ikke meget kultur i.

Hvis han havde læst på lektien, ville han vide at sand kunst til alle tider har forandret og udviklet samfundet, ved at hele tiden at stille spørgsmålstegn ved menneskers måde at opleve verden på. Derved har den også ændret de politiske vilkår.

**Jógvan á Lakjuni diskvalificerer sig selv gang på gang**

Efter min mening har Jógvan á Lakjuni alvorligt diskvalificeret sig selv ved at igen at angribe mændene og ikke bolden. Han angriber personer, der er en væsentlig del af livsnerven i det område han er sat til at administrere og udvikle. Han burde være glad for modspil, der kan gøre ham klogere. Arnbjørn Ó. Dalsgarð, Carl Johan Jensen, Jenny Pedersen og Rói Patursson er fremtrædende kulturpersoner på landets kulturscene. De har selvfølgelig en forpligtelse til at gøre opmærksom på, at de økonomiske forhold på kulturområdet langt fra er optimale, især ikke når vi ser den anvendelse af kultur, som det offentlige og den politiske verden ivrigt gør brug af hele tiden. Kulturen bliver brugt som garniture, lige så snart Føroyar skal promoveres udenlands eller i andre sammenhænge. Der er masser af brug for kultur, men ingen penge.

Det er ikke første gang Jógvan á Lakjuni diskvalificerer sig selv. Vi husker alle da han i alt sit embedes vælde i august 2005 trådte frem på den udenlandske scene med sit eget private indsnævrede livssyn: “Jeg er overbevist om, at det bliver vores nations vanskæbne, at landets myndigheder støtter at godtage det homoseksuelle liv som noget naturligt.” En sådan udtalelse er der ikke meget kultur i.

Vi glemmer heller ikke, hvordan Jógvan á Lakjuni reagerede, da der blev stillet spørgsmål til den færøske diskrimination af homoseksuelle i Nordisk råd i efteråret 2006. Der stillede han sig op og blamerede sig med sin pinlige fornærmelse ud over hele forsamlingen og i alle de nordiske medier. Det overgås kun i pinlighed af Jenis av Ranas udskældning af udenlandske journalister fra talerstolen i Føroya Løgting under §266b debatten.

**Denne skamløse sammenblanding**

Når Jógvan á Lakjuni råber op om, at kultur og politik ikke bør blandes sammen, er det måske for at lede opmærksomheden væk fra den virkelige katastrofale sammenblanding i færøsk politik: Religiøse regler og borgerlige love.

Hvis kulturministeren havde været virkelig interesseret i kulturområdet, havde han arbejdet for sekulariseringen af det færøske samfund. Det er nemlig en af de vigtigste forudsætninger for rummelighed i samfundet, der igen er en af de vigtigste forudsætninger kulturel diversitet og blomstring på kulturområdet. Som det er nu medvirker Jógvan á Lakjuni med sin skamløse sammenblanding af tro og politik, til at skræmme kreative kræfter af landet og derved dræne den færøske talentmasse. Det er der ikke meget kultur i.

**Jógvan á Lakjunis fremtidige job?**

Vi skal ikke glemme at størstedelen af kunstnerne her i landet bare en brøkdel af den indtægt som vores kulturminister skraber til sig i sit politiske virke. Det er det evige paradoksale indenfor kulturområdet, at de skabende kunstnere lever på et eksistensminimum, mens folk der administrerer kulturområdet får fuld løn, ferieløn, pensionsordning og alt hvad der hører sig til.

At Jógvan á Lakjuni er nervøs for sit fremtidige indtjening er forståeligt med den tvivlsomme stil han lægger for dagen, men det er jo strengt taget ikke vores problem. Jeg vil foreslå han han finder sig et område han har et minimum af forståelse for og hvor han gør mindre skade. Han kunne måske blive konsulent i fornærmelse. Det er der ikke meget kultur i, men det er jo altid rart at arbejde med noget man er god til.

14. januar 2008

# Nýggjur Hvalbiartunnil

RÓÐIN THOMSEN

Hóast tað vóru stórverk, ið framd vóru, tá ið elsti tunnilin í Føroyum, Hvalbiartunnilin, varð tikin í nýtslu í 1963, og tunnilin til grannabygdina Sandvík bara 6 ár seinni varð tikin í nýtslu, so hevur politiska valdið ikki megnað at dagført tunlarnar. Av tunlum í Føroyum er Hvalbiartunnilin raðfestur aftast. Hetta kunnu hvalbingar ikki lata sær lynda í 2008. Tí eigur løgtingið at ganga ynski hvalbinganna á møti, at farið verður undir at gera nýggjan tunnil millum Trongisvágs og Hvalba. Sambært nútíðarinnar krøvum lýkur Hvalbiartunnilin ikki ásettu minstukrøvini, tá tað snýr seg um trygdina og dygdina í føroyskum tunlum. Tað er eingin ivi um, at Hvalbiartunnilin er lívshættisligur og ótíðarhóskandi, tí í tunlinum er eitt nú eingin trygdarútgerð so sum eldsløkkingarútgerð, skuldi eldur komið í inni í tunlinum, so er eingin útgerð til at sløkkja eldin, og eingir møguleikar at boða frá eldinum og eingin útgerð, sum forðar øðrum akførum at koyra inn í tunnilin; tí har er einki fartelefonsamband. Eingi ljós eru í tunlinum, eingin ventilasjón, eingi gassmátitól, einki neyðsamband, einki radiosamband. Vánalig uppmerking av vegnum, einsporaður tunnil, vendipláss. Vánaligur gjøgnumtrekkur. Stórar gelgrúpur hanga undir loftinum, tá ið frost er, og sum kann vera til miklan ampa fyri ferðsluna. Eisini er grót rapað undan loftinum í tunlinum fyri stuttum, og sum lættliga kundi havt elvt til vanlukku, men til alla lukku. Vegurin í tunlinum er skitin og smalur, og eisini er lágt frá loftinum. Hetta darvar ferðsluna í tunlinum og í stóran mun forðandi fyri vinnuna í Hvalba, har tunnilin er neyðugur partur av tí virksemi, sum blómar í Hvalba. Skal útjaðarin verða partur av einum vælferðarsamfelagi, har ein og hvør eigur at kenna seg tryggan í ferðsluni, so er eisini neyðugt, at trygdin í føroyskum tunlum lýkur nútíðarinnar krøvum.

Mítt ynski til mína kæru heimbygd skal vera mín áheitan á landsins politikarar: at nýggjur tunnil verður gjørdur millum Trongisvágs og Hvalba.

# Hvat sigur profetorðið um sjálvræði og suverenitet?

DAVID BECH

Jesus sigur í Luk. 21, 29-31 Og hann setti teimum fram líknilsi: «Hyggið fikutræið og - øll trøini! So skjótt sum tit síggja, at tey spretta, vita tit av tykkum sjálvum, at nú er summarið nær. Soleiðis skulu tit eisini, táið tit síggja hetta henda, vita, at ríki Guds er nær«.

Hetta líknilsi verður tulkað á henda hátt, fikutræið er Ísraelsland og hini trøini eru hini londini. Tann 14. mai 1948 gjørdist Ísrael sjálvstøðug suveren tjóð; tá byrjaði fikutræið at spretta og grógva og ein kann ímynda sær mangt eitt menniskja, ið runnið er av sannleiksrót og mangan søguskrivara við ábyrgd, og vit onnur, gripin av undran yvir at síggja hetta undurið, fikutræið - Ísraelsland, vaksa fram og blóma sum urtagarður Edens á jarðarinnar nalva. Eitt land sum fyri hálvari øld síðan mest var at líkna við eina oyðimørk, men sum síðan 1948 og fram til dagin ídag hevur ment seg til at verða ein av heimsins fremstu tjóðum, bæði andaliga, mentanarliga, søguliga, búskaparliga og ikki minst hernaðarliga. Sigast má, ein sannur valdsfaktorur mitt á jørðini.

Men Harrin segði ikki bara fikutræið - Ísraelsland, men eisini hini trøini - londini, skuldu gerast fríar suverenar tjóðir, eisini lítla træið - landið Føroyar, er undirritaði sannførdur um, er roknað við.

Aftaná 1948 táið Ísrael fekk tjóðarfrælsi, kom rættilig ferð á hjá hinum londunum at fáa tjóðarfrælsi og síðan 1948 er tað ein ørgrynna av kolonium og hjálondum sum ídag eru sjálvstøðugar suverenar tjóðir. Og hendan gongdin heldur áfram, ja sjálvt í okkara ríkisfelagsskapi. Tað lítla træið - landið Føroyar rópar um suverenitet, Grønland, sum er við í felagsskapinum rópar somuleiðis um tjóðarfrælsi. Mong lond úti í heimi kundi verið nevnd, men lat okkum nevna eitt: Tað Palistinska fólkið, eitt fólk uttan samleika (identitet), ið hevur fjakkað runt uttan nakað heimland, men sum nú við treysti og stórum bjartskygni, sum ongantíð áður, kann síggja fram til, at dreymurin um egnan suverenan stat, kann gerast veruleiki.

Fyri at venda aftur til træið. Hví samanber Harrin londini, eisini okkara land, við eitt træ? Jú eitt træ er sett saman av einari rót, einum buli (stammu) og av greinum og bløðum. Eitt og hvørt træ er sjálvstøðugt. Tað hevur ikki fyri neyðini ígjøgnum rótina at verða samanbundið við eitt annað størri træ fyri at fáa føði, nei, har tað er gróðursett tekur tað til sín, gjøgnum rótina føði (vætu og sevju) og alt tað, ið orkukeldan sólin framleiðir, fyri at kunna vera sevjuríkt og grønt og bera búnan ávøkst.

Á sama hátt er tað við einum landi (tjóð). Tað má verða sjálvstøðugt fyri at kunna taka til sín allar ressursir, ið tað hevur fyri neyðini, fyri at kunna vaksa og kunna gerast eitt valatræ - land - tjóð.

Tað undirritaði vil nema við her er hetta. Tað er ikki dugnaskapur politikkaranna eina í Føroyum og øðrum londum, ið virka fyri tjóðarfrælsi, ið skapa hesar loysingarhugsjónir, nei, tað er profetaorðið ið gongur út. Undirritaði nýtir eitt bíbilskt orðafelli: Sum tit bæði síggja og hoyra. Tá ið tit síggja hetta henda skulu tit vita, at ríki Guds er nær, tað skal líka nevnast, at her er ikki bert talan um tað ríkið, sum skriftirnar siga: Er innan í tykkum (teim heilagu), men um dýrdarríku komu Harrans í mátti og miklari dýrd.


